# Pennastrokið hjá Høgna

**Høgni Mikkelsen**
*valevni Sambandsfloksins í Suðurstreymoy*



Eitt orðatak sigur, at alt letur seg gera á pappírinum. Og spart er ikki uppá pappíri í stríðnum hjá Høgna, Anfinn & Co, um loysingina.

Teir hava roknað upp og niður, uppá fíggjarligu avleiðingarnar av at loysa frá Danmark. Penastu tølini góvu teir út í "Hvítubók" sum greitt sigur, at vit kunnu loysa. Men treytin er eisini, at fyritreytir eru til staðar. Ein av teimum, er niðurlaging av almenna sektorinum.

Sum vit øll vita, so er Tjóveldisflokkurin "knall-reyður" tá tað snýr seg um ta polittisku sannføringina, og Fólkaflokkurin ger bert tað ið tænur honum sjálvum best. Tað er tí vónleyst at hugsa sær, at hesir skulu fáa nakað skilagott frá hondini.

Men Høgni Hoydal ætlar kortini at loysa við einum pennastrokið. Eg hugsaði, um tað mundi verða við penninum hjá Anfinni, sum er nevndur í "Skjót journalistin" og sum skrivaði eitt-tølini norðuri í Hvannasundi, tann tíð tað var.

Við sambandsflokkinum í landsins leiðslu, fært tú trygd fyri, at politikkur snýr seg um borgaran og hansara vælferð, og ikki dreymar og persónligar trupulleikar hjá politikkarum, sum vit hava verið vitni til seinastu árini.

# Ráð til bústað?

**Inga Foldbo Hjallnafoss**
*valevni Sjálvstýrisfloksin í Suðurstreymoy*



Tað er í so nógvum umstøðum, at tørvur er á einum minni búðstaðið, ið ikki krevur 2 inntøkur. Vit kunnu nevna eldri fólk, einstaklingar og ungar familjur, ið just seta búgv. Tørvurin er viðurkendur, og tí eru fleiri útstykkingar og byggjarí í gongd, har hædd verður tikin fyri støddini. Vit mugu tó ásannað, at tað eisini til hesar búðstaðir skulu 2 inntøkur at fíggja keypið, um ikki munagóð uppsparing er til staðar

Sjálvstýrisflokkurin vil gera nakað við hesi viðurskifti. Ein íbúðarpolitikk, ið umfatar leiguíbúðir, at hesar eisini kunnu metast trygg og fíggjarliga forsvarlig íbúðarloysn. Ein íbúðarpolitik, sum fremur hesar møguleikarnar.

At skapa hesar møguleikar er eisini at veita fólki stórri fíggjarligt rásarúm, og hevur tí stóran týdning fyri trivnað, arbeiðshug og liviumstøður sum heild.

Hetta eru viðurskifti, ið Sjálvstýrisflokkurin leggur stóran dent á.

Hesum vil eg virka fyri!

# Alternativar vinnur

**Sámal Petur í Grund**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymoy*



Ein av reklamunum sum sum hava verið í sjónvarpinum í eina tíð, er reklaman frá ALV um at keypa føroysk ringbind.

Vónandi er tað so, at allir almennir stovnar keypa síni ringbind frá hesum stovni, sum nýtir arbeiðsorku frá landsmonnum við skerdum førleika.

Fólkini aftanfyri ALV hava í mong ár slóðað veg fyri teimum, sum á ein ella annan hátt hava ein skerdan førleika á arbeiðsmarknaðinum.

Vit vita, at tað eru vinnur sum ikki eru lønsamar eftir vanligum marknaðartreytum og sum tí ikki eru partar av okkara vinnulívi.

Hesar vinnur áttu at verið ein sjálvsagdur møguleiki hjá teimum, sum ikki hava fullan arbeiðsførleika.

Tað átti at verið meginreglan, at ongar veitingar vera givnar fólki í arbeiðsførum aldri, uttan at ein ella onnur uppgáva fylgir við.

Hendan uppgávan eigur at vera tilpassa arbeiðsførleikan hjá móttakaranum av veitingini.

Henda skipanin hevði ikki verið avlagandi fyri vinnulívið, við tað at vinnulívið altíð hyggur eftir marknaðartreytunum.

Okkara land hevði blivið eitt betri land at liva í, tann dag tá meining lá aftanfyri allar gerðir og allar veitingar.

X við lista D.

# Svart Samband ella Tjóðveldi

**Heidi Petersen**
*valevni Tjóðveldisfloksins í Norðurstreymoy.*



Endalig innliman í danska ríkið.

Sambandsflokkurin stendur til at vinna valið. Tað sum undanfarna samgonga setti sær fyri at náa við útbyggingum av samfelagnum á øllum økjum, samstundis sum hon gjørdu okkum minni og minni bundin at danska statinum, stendur til at falla, og ábyrgdarleyst heimastýrið er um at koma til valdið aftur. Og hetta er ikki nóg mikið, Sambandsflokkurin hevur eisini í valskrá síni eina endaliga staðfesting av danska yvirvaldsrættinum í Føroyum. Og harafturat nakað so ótrúligt sum, at vit í Føroyum ikki skulu hava møguleika fyri einari føroyskari grundlóg. Og enn er ikki liðugt við ørskapinum, tí næstu ferð danska grundlógin skal broytast, skal føroyska heimastýrið staðfestast í henni. So vandamiklari leið lýsir Sambandsflokkurin við til hetta valið.

**Lagnudagurin 20.januar.**
So valdagurin 20. januar verður ein lagnudagur fyri Føroysku tjóðina.

Føroyingar skulu 20. januar taka støðu til um vit framhaldandi skulu arbeiða fyri at skipa eitt Føroyskt tjóðveldi, ella eini endaligari innliman í danska statin? Vit skulu taka støðu til um vit framhaldandi vilja útbyggja okkara land, ella lata alt steðga upp? Vit skulu eisini taka støðu til um vit vilja hava eitt stuðulsfrítt vinnulív, ella eitt vinnulív sum fer beint í lumman hjá skattgjaldaranum eftir peningi tá tað gongur illa? Vit skulu eisini taka støðu til um vit vilja hava ábyrgdarfullan búskaparpolitikk ella ábyrgdarleysan studningsbúskap?

**Vel framtíðina - vel Føroyar.**
Okkum tørvar allar kreftir í Føroyum at standa saman um Tjóðveldiskósina, og vísa heiminum at vit eru eitt fólk við virðin fyri okkum sjálvum og øðrum. Eitt fólk við vilja og mátti at loysa uppgávurnar og taka tær avbjóðingar sum framtíðin bjóðar. Og eitt fólk við árraði og dirvi at taka ábyrgd.

Tað liggur í tínum hondum at gera av hvørja kós vit skulu halda. Við einum sterkum Tjóðveldisflokki á tingi 20. januar tryggjar tú at Føroyar vinna.

Gott val.

# Skamma teg, Jenis!

**Klæmint Olsen**
*valevni Sjálvstýrsifloksins í Suðurstreymoy*



Vóru tað bara Ginu-søgurnar, ið gjørdu, at blóðið fór í kók hjá Miðflokkinum? Ella hava vit í dag ein flokk á tingi, ið av røttum kann kallast antimentanarligur? Uppskot Miðfloksins um skerjingar á mentanarøkinum er ein fráboðan um nýggjar tíðir og nýggjar siðir.

Mest av øllum minnir tað um tað fyrra. Eina hevndaratsókn móti teimum, ið hava torað at staðið fram og bjóðað tí føroyska trongskygninum av, tað veri seg innan list ella gransking. Um hetta er politiska stevna Miðfloksins, so er vissuliga talan um nýrák í føroyskum politikki. Eg vil fara so langt sum at siga, at fólkaræðið er í vanda..

Kanska er talan tó um tað seinna. Eina umhugsaða meting av, hvat ið er gott og ringt. Føroyskur sjónleikur eigur ikki at verða stuðlaður, tí hann er av tí illa. Peningagávur eiga ikki at verða latnar, tí tað eru tey somu fólkini, ið geva hvørjum øðrum tær.

Vónandi hevur Miðflokkurin við sínum uppskoti sett seg so dyggiliga í skammikrókin. Vantandi virðing fyri mentanini er lívshættilig, kanska ikki fyri hin einstaka, men fyri tjóðina. Tí tá ið breyðið er komið á borðið, er tað ikki tað politiska frælsið, ið ger føroyingin til tað, hann er, men tað mentanarliga. Nýggj ella gomul mentan, báðar hava virðing uppiborna.

Teir, ið løgdu lunnar undir tjóðskaparrørsluna, vóru ikki trongskygdir. Teir vildu varðveita og menna føroyskt mál og føroyska mentan, men eisini ríka tað við tí besta úr útlendskum andslívi. Er tað ikki eisini so dagin í dag? Ræðast vit og byrgja okkum inni, so býður ikki bøtur.

Hvat var tað okkara stóri listamálari og móttakari av mentanarvirðisløn landsins - Ingálvur av Reyni - segði um stóra list? Haldið mær til góðar, at eg ikki minnist tað orðarætt, men var tað ikki okkurt um, at hon skuldi vera "provokerandi".



VALGREINAR

# Sama skattalætta til øll

**Malan Johansen**
*valevni Sjálvstýrisfloksins í Suðurstreymi*



Allir føroyingar hava rætt til sama skattalætta sum sjómenn. Tí fari eg at arbeiða fyri, at allir føroyingar stigvíst fáa sama skattalætta, sum sjómenn hava.

Hetta grundi eg á, at tað er moralsk skeivt at raðfesta ein samfelagsbólk hægri enn ein annan. Sjómaðurin er nógv verdur fyri okkara samfelag, vit kunnu ikki vera hann fyri uttan. Men vit kunnu heldur ikki vera flakafólkið, alaran, handilsfólkið, vaskifólkið ella vinnulívsfólkið fyri uttan. Vit eru øll líka týdningarmikil í arbeiðinum at byggja okkara land.

**Ikki búskaparliga rætt**
Harumframt er skattalætti til ein ávísan samfelagsbólk ikki rætt búskaparliga. Ein tilíkur skattalætti er studningur bara í einum øðrum hami enn vit eru von við. Royndirnar frá 80'unum, tá studningurin millum annað varð givin sum krónur per kilo, hevur víst okkum, at tað ikki er vegurin fram. Studningurin, í hesum føri skattalætti, ger, at fiskivinnan ikki tekur tær røttu avgerðirnar, tí trýstið at fremja effektiviseringar minkar. Sigast kann at studningurin fyllir holið. Men fiskivinnan eigur at tillaga seg alla tíðina, tí annars versnar kappingarføri. Um ikki fiskivinnan tillagar seg verður fiskað við størri útreiðslum enn neyðugt. Tað hava vit ikki ráð til.

Setið kross við lista D

# Búskaparmening, leiðsla og bygnaður

**Niels Hammer**
*valevni Miðfloksins í Suðurstreymoy*



Samfelagsbygnaður, menning og almen rørsla eru fyribrygdi og mál íð dagliga viðkoma almenna kjakinum, og fyrikoma tí sostatt eisini javnan.

Nú til vali er eisini nógv tikið saman um. Og nógv verður tosa, um broytingar og annað.

Um neyðug stig at taka, fyri at røkka eini betri búskapartilgongd og tillagan íð er førð fyri at taka hædd fyri bæði minking og vøkstri á vinnu- og arbeiðsmarknaðar økinum í síni heild.

Vit fara til val fyri at vera við til at skapa neyðugar fortreytir fyri einum haldgóðum og burðardyggum samfelagsminstri og skipan, og er hetta eisini aðalmál okkara.

Broytingar íð eru framdar tey seinastu árini til bata fyri samfelagið fara vit at varða um, og í níggja valskeiðnum við ábyrd og heilum huga, at bøta enn meir um tær.

Leiðsla og fyrisiting eiga munandi leiklut í hesum høpi, og eigur hon tí at veita einstaka borgaranum skjóta og rætta tænastu.

Góð og virkin leiðsla fæst bert við raðførdari og skinsamari ráðgeving, sum við røttum innliti og vitan megnar at taka samanum, og harvið ásettum málum at fremja og seta í verk.

Trupuleikin við strongd á sjúkrahúsum og serrøktarviðgerðum - kunna vit koma til lívs …

Um framhaldandi útbygging á medesinska- og tøknifrøðiliga økinum verður raðførd, eins og viðgerðarsamskifti sjúkrahúsini sín á millum verður ment og gjørt samtíðarhóskandi við at bygnaður og samskifti verða nútíðar raðførd, …so at bíðitíðin á skurðviðgerðum og aðrari bráfeingis viðgerð, verður munandi stytt.

Ætlanir sum hesar eru ikki ókendar, men havdar nógv á lofti upp undir bæði farin val, eins og nú, í tí politiska valkjakinum. . . tó uttan at føra ítøkilig framtøk við sær.

Vit hava sum vælferðarsamfelag bøtt um hesi viðurskifti. Men fari eg av øllum alvi at virka fyri at hesar umstøður verða betraðar munandi, og at sjúkra viðgerðarstøðið fylgjandi verður nútíðar raðført fyri at vit ikki skulla verða afturúrsilgd ella fyri vanbýtið, tá talan er um heilsu- og sjúkrarøktarviðgerð.

**Útslúsan . . ..**
Eg vil vísa á gongda leið tá talan er um ovbyrðjaðar og strongdar eindir innan sjúkrahúsverkið og deildir tess At framúr góðar og munadyggar royndir eru framdar við námsfrøðiligari medesin- og serrøktarfakligari viðgerð á útslúsingar fremjandi deild.

Henda skipan og verkætlan íð er tillagað viðurskiftunum og nýhugburið, er eftir míni samføring bráðneyðug og eigur at verða sett í verk sum skjótast. Serrøktarfakliga vitanin og viðgerðin, gerst í størsta mun kompetence fremjandi fyri sjúkrahúsini kring landi og heilsuverkið yvirhøvur, bæði hvat viðvíkur námsfrøðiligari sjúkraserrøktarviðgerð og heilsumennandi ástøðið brúkarans, og eigur tí at verða raðfest frammaliga og sett í verk skjótast tilberð.

Nevnda viðgerðarskipan vil menna heilsuverkið minka um og loysa trupulleikan á strongdu deildum sjúkrahúsins.

Eisini ber sonevnda útslúsingarviðgerðin økta og raðførda medesin- og røktarpedagogiska serfrøðisútbúgving við sær, øllum heilsuverkinum at frama.

Við sera góðum útliti er skipanin roynd og raðfest, við millum annað respiratorbrúkarum.

Vit eiga tí beinleiðis, og hartil skjótast tilberð, at fáa nevndu heilsufrøðisligu útslúsingar verkætlan framda á skinsaman viðgerðar- og tøknifrøðiligan hátt, soleiðis at vit sjálvi megna, og altíð eru tøk, og til reiðar at taka við viðgerðini av nevndu serrøktar sjúklingum, til endaliga útslúsan.

**Heima- og eldrarøktin …**
Er eins og øll onnur øki í samfelagsskipanini undir somu fortreytum.

Skipanin eigur at raðførast eftir bráðfeingis tørvi og sjálvsagda rætti brúkarans til framhaldandi hjálp og stuðul, fyri at varveita trygd og trivnaðarstøðið hjá tí eldra og tí óhjálpna brúkaranum.

Vitandi og samførdur um støðuna, fara eg at virka fyri at skipanin verður tíðarhóskandi og laga eftir tilætlaða og munardygga ástøðið sínum.

Tíðaravmarkan og strongd á økinum elvur til ótrivna og misálit og er tíðuligt fyribrygdi íð eigur heilt at fella burtur úr skipanini, fyri at økið skal kunna raðførðast á jøvnum støðið við arðar verkætlanir í samfelagsmenningini. Eisini hesum eiga vit at koma til lívs, og er hetta eisini møguligt við skinsamari stýring og fakligari menning, eins og neyðugari fíggjarjáttan.

Økið er fjølbroytt og eigur tí at skipast á ástøðiliga vitan og bygnað, so at brúkarin kennir seg tryggan og sanførdan um at júst tann besta loysnin er honum tillutað, tá íð ástendur.

Mentunarhugsjónin og evni … er tilluta og givin okkum øllum.

Um tú missur hana, letur annan darva ella møguliga taka hana frá tær, verður tú fátækur.

Læt teg ikki ræða … hugsjónin er tín. Tað veri seg á ríka fjølbroytta listarliga leikpallinum, handaverkið, útbúgving, námsfrøði, gransking og vísind, ella arðari tøknifrøðisligari verkætlan.

Vit eiga at virka fyri menning og dygdargóðum virkiskarmi fyri tí í vildi nýta evni og lív sítt á hesum øki sum heild. Soleiðis at fortreytirnar hjá verandi og komandi ættarligum eru skipaðar og tilrættalagdar á hugvekjandi og skinsaman hátt.

At ymisk settu ráðunum verður tillutað ábyrgd og umsitingar førleika, í røttum mennandi karmi og smidligari virkisfremjandi verkætlanum.

Undir farnum umsitingum og stýrisskipanarlóggávu eru málsøkini framd og tillaga alt eftir viðurskiftum okkara. Og eiga vit sum nú førða mentanina fram, at fara væl um tað íð liti er okkum upp í hendur, men tó, og ikki minst, seta egnu frámerkir okkara her, komandi ættarligum at gagni og tjóðini at frama.

Guð signi land og fólk

Gótt val

# Almenna umsitingin bólgnað við 107 mió. kr.

**Vilhelm Johannesen**
*løgtngsmaður og valevni Javnaðarfloksins í Norðoya valdømi*



Talið av aðalráðum er hækkað úr seks uppí níggju. Talið av fulltíðarstørvum í almennu umsitingini er hækkað úr 103 upp í 268 størv.

Ein vøkstur á 165 størv. Í prosentum svarar hetta til ein vøkstur á 159 %.

Í 1997 var kostnaðurin av landsumsitingini 37 mió. kr. Í ár fara aðalmáláráðini at kosta 144 mió. kr. Ein vøkstur á 107 mió. kr. Í prosent-um svarar hetta til ein vøkstur á 288 %.

Úti millum veljararnar hevur fólkaflokkurin altíð ávarað ímóti einum alt ov stórum og kostnaðarmiklum almennum yvirbyggningi. Eisini hava teir skuldsett okkum í javnaðarflokkinum, fyri at vaksa almennu umsitingini, og fyri at økja um almennu peninganýtsluna, men nú gongur sjón fyri søgn. Tølini omanfyri, lýsa óhugnaligu gongdina seinastu seks árini.

Øll hesi árini hevur fólkaflokkurin havt ta politisku leiðsluna í landinum. Øll hesi árini hevur hann verið væl stuðlaður av tjóðveldisflokkinum og sjálvstýrisflokkinum. Og hesi seinastu tvey árini hevur miðflokkurin eisini verið stuðulsflokkur. Men prísin fyri hesar stuðulsflokkarnar, sum er ein økt almenn umsiting á 107 mió. kr. um árið, sleppur skattgjaldarin at rinda.

Í valskrá síni sigur javnaðarflokkurin, at almenni byggnaðurin skal ikki vera størri enn hóskiligt er, og tað merkir, at vit skulu hava seks aðalmálaráð og ikki níggju. Hetta kunnu vit gera, við at leggja almannamálaráðið og heilsumálaráðið saman aftur til eitt almanna- og heilsumálaráð, við at leggja oljumálráðið saman við vinnumálaráðnum og við at leggja løgmálaráðið undir løgmansfyrisitingina.

Eg havi áður víst á, at í Japan, við 120 milliónum fólkum, hava tey 13 ráðstovur og 13 ráðharrar. Her í Føroyum hava vit níggju aðalmálaráð og nýggju landsstýrisfólk at umsita 47.000 sálir. Hvar er logikkurin? Hetta er jú fullkomuliga vitleyst. Hetta er so vitleyst, at her má vend koma í, og tað beinan vegin. Tit hava høvið at venda skeivu gongdina á løgtingsvalinum 20. januar.

Eftir løgtingsvalið í 2002, helt landsstýrismaðurin í oljumálum við ongari olju, at hann hevði ov lítið at umsita og tí eisini ov lítið at gera. Fyri at ugga landsstýrismannin, soleiðis at hann aftur kundi flenna, varð eitt nýtt málsøki gjørt til hansara. Hetta málsøki fekk navnið: "Útoyggjamál". Á fíggjarlógini eru játtaðar 300.000 kr. til hetta málsøki. Áðrenn tit lesa víðari kunnu tit gita, hvar og hvussu hesar 300.000 kr. verða nýttar. Trúgva tit at tær verða nýttar úti í Fugloy ella Svínoy ella suðri í Skúgvi? Trúgva tit at tær verða nýttar í Kalsoynni, úti í Hesti ella vesturi í Mykinesi? Nei, nei, tað er nógv verri enn so. Tær verða nýttar at løna einum fulltrúa við, sum hevur skrivstovu suðri í Havn, og soleiðis fær Tórshavnar kommuna nakrar skattakrónir aftrat. Tit kenna orðatakið: "Alt er søtt hjá tí svanga." Við øðrum orðum: játtanin til útoyggjamál er við til at økja um miðsavningina. So einfalt er tað.

Vendi skeivu gongdini. Farið mannsterk á val og seti ein sterkan javnaðarflokk inn á ting. Seti X við lista C ella eitt av valevnunum á lista javnaðarfloksins.